# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Um 14 dagar fara tit at siga, at hatta var eitt javnt, val og eg vænti, at eg fari at vinna*
*John McCain*

# Danskir hermenn skotið nógvar talibanar

Herleiðslan skal upplýsa, hvussu nógvir talibanar eru falnir fyri donskum kúlum í Afghanistan

Ta seinastu vikuna hava danskir hermenn verið við í einum umfatandi álopi á Taliban í Afghanistan. Danska herleiðslan hevur upplýst, at 11 talibanar fullu í bardaa við danskar hermenn, men aðrar keldur siga, at teir donsku hermenninir hava gjørt av við umleið 50 talibanar teir seinastu dagarnar.

Tað hevur fingið fleiri politiskar flokkar í Danmark at krevja, at herleiðslan skal upplýsa, hvussu nógvir talibanar eru falnir fyri donskum kúlum.

- Í dag tola fólk at hoyra sannleikan, og eg fari at biðja verjumálaráðharran upplýsa talið, sigur verjuframsøgumaðurin hjá Sosialdemokratunum, John Dyrby Paulsen, við Politiken í dag. Sambært blaðnum taka aðrir framsøgumenn undir við honum.

Men herleiðslan er ikki fegin um kravið. Henrik Sommer, oberstur í herleiðsluni, sigur við Politiken, at danski herurin hevur tað støðu, at hann upplýsir ikki, hvussu nógvar fíggindar hermenninir hava gjørt av við. Hann sigur, at herurin hevur eingi almenn hagtøl um slíkt, men viðgongur, at sambært reglunum skulu hermenninir aftan á hvønn einstakan samanbrest siga frá, hvussu nógvar fíggindar teir hava rakt. Upplýsingarnar verða so latnar bretsku herleiðsluni í Afghanistan, sum hevur teir donsku hermenninar har undir sær.

## STUTT SAGT

### Clinton skal hálpa Obama

Hesa vikuna fær demokratiska frosetavalevnið í USA, Barrack Obama, hjálp frá fyrrverandi demokratiska forsetanum Bill Clinton. Valnevndin hjá Obama boðaði í gjár frá, at Bill Clinton fer at taka lut í einum veljarafundi, sum Obama skal halda í býnum Orlandi í statinum Florida.

Eins og Barrack Obama ber Bill Clinton orð fyri at hava góðar taligávur og at duga sera væl at fáa samband við áhoyrararnar, og á fundinum í Orlando skal hann royna at sannføra tey, sum stýðjaðu Hillary Clinton undir uppstillingini, um, at nú eiga tey at atkvøða fyri Obama. Sjálv var Hillary Clinton á einum uppstillingarfundi hjá Obama í síðstu viku.

Florida er ein av teimum statunum, sum sambært kanningunum kann fáa avgerandi týdning fyri úrslitið av forsetavalinum í næstu viku. Bæði Barrack Obama og John McCain leggja seg tí eftir at fáa fólk har at atkvøða fyri sær.

### Págvin til Afrika at vitja

Benedikt 16. pávi kunngjørdi um vikuskiftið, at hann ætlar sær til Afrika at vitja í mars næsta ár. Kunngerðin í einari prædiku, sum pávin helt í Pæturskirkjuni í Rom í sambandi við, at ein biskuparáðstevna endaði. Ráðstevnan, sum var fyri katólskum biskupum úr øllum heiminumn, hevur verið í Vatikaninum tríggjar tær seinastu vikurnar.

Ferðina í vár verður tann fyrsta hjá pávanum til Afrika, síðani hann tók við sum ovasti fyri teirri rómsversk katólsku kirkjuni, og ferðin hevur samband við, at næsta heyst verður ein stór Afrika-ráðstevna í Vatikaninum, har ymisk viðurskifti í heimspartinum skulu umrøðast, skrivar AFP.

Síðani hann bleiv pávi, hevur Benedikt 16. ferðast í Brasil, USA, Avstralia og nøkrum mlondum í Evropa.

# Vil tosa við misnýttar kvinnur



*Ingrid Betancourt er heiðrað fyri arbeiðið fyri demokratii, tolsemi og friði*
*Mynd: Polfoto*

Ingrid Betancourt heldur, at tær eiga at tosa um felags royndir av at vera gíslar

Ingrid Betancourt, sum var gísli hjá kolombisku rørsluni FARC í seks ár, til hon slapp leys í summar, ætlar sær at hitta eysturríksku kvinnuna Nataschu Kampucsh, sum var gísli í einum kjallara í Wien í átta ár. Harumframt ætlar Ingrid Betancourt at fáa orð á Elisabeth Fritzl, sum sat gísli hjá pápa sínum og fekk fleiri børn við honum.

Betancourt, sum júst hevur vunnið ta árligu heiðursløнina Women's World Award, sigur við CNN, at við sínum egnu royndum dugir hob væl at skilja tað, sum Nataschu Kampusch og Elisabeth Fritzl hevur verið fyri.

Natascha Kampusch var gísli í átta ár, áðrenn tað eydnaðist hanni at flýggja fyri tveimum árum síðani. Elisabeth Fritzl var gísli hjá pápa sínum, sum misbrúkti hana kynsliga og fekk sjey børn við henni. Hana sleppur Ingrid Betancourt ikki at hitta enn.

- Eg veit væl, at Elisabeth er avbyrgd enn, og at eg tí ikki kann sleppa at tosa við hana nú. Men hon og hennara skulu vita, at mínir tankar eru hjá teimum, sigur Ingrid Betancourt við CNN. Hon sigur, at hon ætlar at fáa orð á Nataschu Kampusch, so tær kunnu tosa um felags royndir.




*John McCain hevur ikki mist vónina um at sleppa í Hvítu Húsini*
*Mynd: Reuters*

# McCain lovar eitt spennandi val

**Tær seinastu meiningakanningarnar í USA benda á, at munurin ímillum tey bæði forsetavalevnini minkar**

- Eg kann lova tykkum, at valið verður spennandi, og eg vænti, at eg fari at vinna, segði John McCain, tá hann helt valfund í býnum Albuquerque í statinum New Mexico leygardagin.

Tann seinasta meiningakanningin vísir, at hann kann fáa rætt, hóast eitt sindur er eftir á mál. Kanningin, sum tíðindastovan Reuters hevur latið gera, gevur Barrack Obama 49 prosent av atkvøðunum annan týsdag og McCain 44 prosent. Hóast munurin er fimm prosentstig, so er tað væl minni enn í einari tilsvarandi kanning fyri átta døgum síðani. Tá bleiv sagt, at Obama var heili 12 prosentstig frammanfyri. Tað var tí ikki so løgið, at McCain helt valhýrinum uppi, tá NBC prátaði við hann í gjárkvøldið.

-Valkvøldið verður eitt av teimum drúgvu, skal eg siga tykkum, men eg vænti, at vit vinna, segði republikanska forsetavalevnið.

### Stríð um ivastatirnar

Bæði forsetavalevnini hava lagt stóran dent á at tryggja sær meiriluta í teimum statunum, har tað sambært meiningakanningunum er lítil munur teirra millum, tí úrslitið í júst hesum statunum kann avgera úrslitið.

Ein nýggj kanning hjá Reuters og Zogby vísir, at Barrack Obama er frammanfyri í ivastatunum Virginia, North Carolina, Missouri, Ohio og Nevada, meðan McCain er frammanfyri í West Virginia og Indiana.

Í statinum Florida, sum fyrr hevur havt avgerandi leiklut í forsetavali, stendur á jøvnum millum valevnini bæði.